# Kjak



**Jógvan á Lakjuni**
*tingmaður*

## "Álvaratos" !

Tað er løgið at sita og lurta eftir einari sokallaðari kjaksending, har í veruleikanum lítið og einki kjak er, men har tað útvalda panelið fyri tað mesta situr og tekur undir við meiningunum hjá hvørjum øðrum og sleppur at gera grin við fólki, uttan at nakar fær loyvi at svara teimum aftur.

Í næst seinastu sending umrøddi panelið eina veljarakanning. Her var heilt týðiligt, at summir flokkar skuldu lyftast upp, meðan aðrir vórðu niðurgjørdir. Og tað løgna er, at í hesari sendingini er einki, sum eitur at vera ógegnigur. – Er veruliga einki, sum eitur ógegni í kringvarpinum?

Seinasta fríggjadag, 13. mai, var aftur ein sending. Eg hoyrdi hana ikki tá, men onkur gjørdi meg varan við hana, og nú eg havi lurtað eftir sendingini, má eg undrast á, hvussu grunt annars álvarslig mál verða viðgjørd. Endamálið tykist ikki vera at lýsa mál frá ymsum vinklum, men at fara eftir persónum, sum hava gjørt vart við sína meining um okkurt evni.

### Spøl á internetinum

Fyrst var tað hetta málið um spøl á internetinum, sum Annika Olsen hevur roynt at gjørt nakað við. Eitt sera álvarsligt mál, sum átti at fingið eina virðiliga viðgerð. Men í staðin fyri at viðgera hetta álvarsliga, so kom Elin Mikkelsen við einum ómetaliga speirekandi úttalilsi. Hon segði:

"Eg eri vís í, at vissi mann letur upp fyri censuri á internetinum, so skal ómetaliga lítið til, áðrenn aðrar skaðiligar sjangrur líða somu lagnu sum spælisíðurnar, tí at hugsið bara um, hvussu nógv teir konservativu religiøsu hava sitið og blokkerað fyri í verandi samgongu, bara tí at teir kundu, og hugsið tykkum, hvussu nógv teir kundu hjálpt mentalu og etisku heilsuni hjá føroyinginum, vissi teir sluppu at steingja skaðiligar heimasíður – á, dú, á, dú, also, vit høvdu ongantíð havt tað betri!"

Also, eingin viðgerð av evninum, men eitt niðrandi álop á onkrar "konservativar religiøsar" politikarar. Eg haldi, at Elin skyldar okkum at siga, hvørjir hesir politikarar eru, og hvat tað er, sum teir hava blokkerað!

### Manntal

Og so var tað manntalið og ein viðgerð av Jørgen Niclasen, sum saman við Bill Justinussen í fíggjarnevndini hevði mælt til at broyta uppskotið nakað, m.a. av tí at ein løgfrøðingur á løgtingsskrivstovuni vísti á, at uppskotið um manntal var ov viðgongt í mun til rættindini hjá tí einstaka borgaranum.

Men í staðin fyri at viðgera evnið, so var tað aftur politikarin, sum var viðgjørdur. Tað var ikki gott, bleiv sagt í sendingini, at ávísir politikarar líkasum sáaðu iva um hesa kanningina. – Men her var heldur eingin at svara aftur.

Eg undrist á, at funnist verður at, at politikarar seta spurnartekin við eina kanning, sum fer so langt inn á privatlívið hjá fólki? Tað hava politikarar skyldu til. – Eingin spurningur varð heldur settur við, um vit hava ráð at gera eina slíka kanning í hesum døgum. Hon kostar ikki minni enn einar 15 mió. krónur, og persónliga haldi eg ikki, at vit hava ráð til tað!

### Etið bláseym?

Men tað mest ógrundaða og marghháttliga, sum bleiv sagt í "Álvaratos" henda dagin, kom frá vertinum sjálvum, Jákupi Magnussen. Hann segði orðarætt:

"Vissi okur taka Fólkaflokkin, so vita okur eisini, at brøðrasamkoman er ein, sum stuðlar Fólkaflokkinum nógv, og brøðrasamkoman er ikki serliga glað fyri at verða skrivað í manntal – tað vita okur av...."

Eg spyrji bara: Hevur maðurin etið bláseym? Og sigur hetta ikki alt um, hvussu vitleys henda sendingin er? Hvussu kann ein vertur í tí almenna kringvarpinum sita og leggja eina heila samkomu í Føroyum undir at vera ímóti einum manntali. Hvat byggir maðurin hetta á?

Haldi, at Jákup Magnussen skyldar okkum eina frágreiðing og eina umbering.

**Í nógv ár hevur ikki verið loyvt at selt sterkari øl enn 5,8%, og nú skulu vit ikki bara bryggja tað í Føroyum, men eisini innflyta og selja tað, líka mikið hvussu sterkt tað er!**

### Sterkt øl og brennivín

Tað síðsta evnið í "Álvaratos" henda dagin var eitt citat frá Portalinum. Jákup Magnussen tók soleiðis til:

"Tað er ein ólukka, at løgtingið hevur samtykt, at tað skal vera loyvt at bryggja sterkt øl og brennivín í Føroyum. Tað heldur Jógvan á Lakjuni, tingmaður, fyri Fólkaflokkin. –– Hvat heldur tú um tað, Elin, ha, ha, ha. – "

Her bleiv heldur eingin seriøs viðgerð. Bara flent upp á spott. Hevði verturin verið at sær komin, so hevði hann ómakað sær at lurtað, hvat tað var, eg segði um hetta málið í løgtinginum. Men tað hevur sjálvandi ongan áhuga!

Sannleikin er, at nú fara vit aftur at selja sterkt øl í Føroyum. Í nógv ár hevur ikki verið loyvt at selt sterkari øl enn 5,8%, og nú skulu vit ikki bara bryggja tað í Føroyum, men eisini innflyta og selja tað, líka mikið hvussu sterkt tað er!

Argumentini um fleiri arbeiðspláss í Føroyum í samband við brygging er eftir mínum tykki einki uttan propaganda. Eg eri bangin fyri, at um tað verða nøkur arbeiðspláss aftrat orsakað av hesum, so vera tey á sjúkrahúsunum, á Blákross og á Heilbrigdi.

Eingin kann lata eyguni aftur fyri øllum teimum vanlukkum, sum rúsdrekka elvir til í Føroyum. Dagliga hoyra vit um harðskap, húsaófrið, hjúnaskilnaðir, upployst heim, vanlukkur, misrøkt børn o.s.fr., o.s.fr., orsakað av rúsdrekka. Hetta haldi eg meg sum politikara hava skyldu til at taka við í metingarnar, tá ið eg taki støðu í rúsdrekkamálum á tingi.

Tað er orsakað av hesum, at eg havi verið ímóti at fara at bryggja og selja sterkari øl í Føroyum. Og tað var serliga tað, hetta uppskotið gekk út uppá!

### Ein primitiv sending

"Álvaratos" er eftir mínum tykki ein primitiv og tendensiøs sending. Verturin kallar hetta eina kjaksending – men tað er heilt týðiligt, at hann velur bara panelluttakarar, sum halda mestsum tað sama (sum hann) og bara umboða ein lítlan part av tí føroysku almannahugsanini.

Føroyingar eru tíverri sambært lóg noyddir at gjalda í dýrum dómum fyri Kringvarp Føroya, sum átti at verið ein mentanarstovnur. Men eg má siga, at eg øtist inn á ta ómentan, sum hesin stovnur í dag loyvir, og eg haldi, at hann í fleiri førum arbeiðir beint ímóti sínum endamálum.



**Poul Michelsen**
*Løgtingsmaður fyri Framsókn*

## Frælsi krevur ábyrgd!

*- og gott politiskt handverk.*

Eitt sindur av kjaki hevur verið um arbeiðslagið í tinginum. Summi halda, at her valdar ruðuleiki og ongin kós. Onkur heldur, at tingið eigur at fara heim, áðrenn tann stóri skaðin hendir. Onnur halda, at løtan er tann rætta, og at tí ræður um at brúka løtuna og fáa sum mest burturúr.

Eg skal viðganga, at eg í langa tingarbeiði mínum ongantíð havi upplivað eina so sermerkta støðu. Men hon er sera spennandi. Tingfólk arbeiða so at siga púra frælst, og fyri fyrstu ferð – kanska nakrantíð – arbeiðir tingið frælst og tingfólk trúgv móti egnu sannføring síni.

Í nógv ár hava politikarar víst á, at vit áttu at roynt eitt minnilutastýri í Føroyum. Og tað er júst tað, vit gera nú. At halda, at hetta bara fór at verða sum at siga tað at gera - er sera bláoygt hugsan. Tí undrar tað meg, at tingfólk, serliga úr Fólkaflokkinum, ikki vilja geva hesi roynd ein møguleika. Vit skulu minnast til, at ongin meira enn Fólkaflokkurin hevur víst á, at vit eiga at royna møguleikan við minnilutastýri.

Onki eigur tingið at fara heim. Har liggja nøkur týðandi mál og bíða eftir at verða loyst. Samstundis læra vit at brúka minnilutastýrið við teimum fyrimunum og vansum, hetta hevur við sær.

Og bara við at royna eitt minnilutastýri kunnu vit staðfesta, um hesin møguleiki er til í framtíðar tingarbeiði okkara.

Hinvegin so eiga tingfólk at læra at brúka tað frælsi, sum er okkum givið í hesum møguleika. Frælsi má verða umsitið við ábyrgd, og tí eru ikki øll mál líka væl egnaði at verða trumfaði ígjøgnum.

Eitt av málunum, sum ikki var egnað at samtykkja henda seinasta tingdag, var uppskotið frá Kára á Rógvi og Bjørt Samuelsen um at seta eina Rættarskipanarnevnd at gera grundleggjandi rættargangslóg fyri Føroyar og gera nýggja føroyska revsilóg.

Ikki tí at eg ikki fult taki undir við, at hetta arbeiði skal gerast, men tí at arbeiðið við at gera so grundleggjandi arbeiði má kjølfestast í størst møguligari semju í tinginum.

Hetta hendi ikki, og tí eri eg sera ivingarsamur, um samtyktin um at gera nýggja rættargangslóg og revsilóg, er komin væl frá byrjan. Uppskotsstillararnir áttu at hugsað um, at til mál av hesum slag krevur meira – krevur heilt einkult betri politiskt handverk. Uppskotið fekk bert 17 atkvøður fyri og 12 ímóti og eina blanka.

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin atkvøddu ímóti – ikki tí at eg haldi, at teir eru ímóti at hetta arbeiðið verður gjørt, men tí at uppskotið ikki var gjørt við tí endamáli at finna breiðastu semjuna.

Eg skal bara vóna, at tað kortini eydnast okkum at finna hesa semjuna, og at vit soleiðis kunnu fara undir at gera nýggja rættargangslóg og nýggja revsilóg fyri Føroyar. Men uttan at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin eru við - kemur hetta arbeiðið ongan veg. Um vit hinvegin hava fulla semju, tá arbeiðið er liðugt, er ikki so avgerandi.

Vit liva politiskt í eini sera spennandi tíð – og við eitt sindur av orku og positivum vilja vænti eg, at vit við hesi minnilutaroynd megna at leggja lunnar undir nýggjum fiskivinnupolitikki, nýggjari pensjónsskipan, nýggjari kommunulóg og nýggjari fólkaskúlalóg.

So læt okkum fara eftir møguleikanum!